## Jónas ímóti Skjold

Danska 1. deildarfelagið Frem spælir í kvøld útsettan dyst ímóti Skjold. Frem liggur nummar 9 í næstbestu donsku deildini, meðan Skjold er nummar 15 og næstaftast. Tríggir føroyskir spælarar eru við í hópinum hjá Frem, men seinastu dystirnar hevur bert høgri bakkur Jónas Tór Næss verið á vøllinum til dyst. Frem byrjaði seinnu helvt av kappingini við fleiri sigrum, men seinastu umførini hava teir tapt. Umráðandi er, at teir vinna dystin ímóti Skjold, sum verður spældur í kvøld kl. 17.30.

## B36 er stórfavorittur

Veddingafyritøkan Nordic Bet ivast ikki í, hvør fer at vinna landskappingardystin ímillum B36 og HB í kvøld. Nordicbet ivast í, um tað verður stórvegis spenningur í stórdystinum milum havnafeløgini, tí fyritøkan gevur pengarnar 3,25 ferðir aftur, um HB vinnur dystin. B36 gevur 1,95, meðan javnleikur

# B-kapping í estetiskum fimleiki

**Fitt av fólki var og hugdi, tá ið fyrsta B-kappingin í estetiskum fimleiki var í ítróttarhøllini á Kambsdali leygardagin**

**FIMLEIKUR**
*Lív Reinert Kjeld*
*liv@sosialurin.fo*

Leygardagin skipaði fimleikasambandið fyri fyrstu B-kappingini í estetiskum fimleiki fyri pinkur, smágentur, gentur og kvinnur.



*Hóast talan "bert" var um eina B-kapping, var støðið á fimleikinum sera høgt leygardagin. Her eru smágenturnar hjá Støkk á gólvinum*

Kappingin var hildin í ítróttarhøllini á Kambsdali, har fitt av fólki var komið at hyggja, hóast veðrið ikki var av tí besta.

Liðini, ið kappaðust, vóru frá Flog, Støkk, Havnar Fimleikafelag og Ljósinum. Smágenturnar og kvinnurnar gjørdu eisini eina íðkan við amboði; smágenturnar gjørdu við hoppibondum og kvinnurnar við gjarum. Íðkanirnar við amboðum vóru dømdar eftir gomlu stórkappingarreglunum.

Fimleikasambandið hevur ikki skipað fyri B-kapping fyrr. Kappingin er mest fyri at fáa fleiri kappingar til fimleikararnar at fara til, umframt at geva øllum møguleika til at kappast við onnur á sama støði.

Kappingin eydnaðist sum heild væl. Næsta kappingin í estetiskum fimleiki er A-kappingin fyri pinkur, smágentur og kvinnur, sum verður í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn.

### Úrslitini

| | | |
|---|---|---|
| **Pinkur:** | | |
| Nr. 1 | HF | 14,15 stig |
| Nr. 2 | Flog | 11,29 stig |
| **Smágentur:** | | |
| Nr. 1 | HF | 15,27 stig |
| Nr. 2 | Støkk | 15,15 stig |
| Nr. 3 | Flog | 11,85 stig |
| **Gentur:** | | |
| Nr. 1 | HF | 15,07 stig |
| **Kvinnur:** | | |
| Nr. 1 | Flog | 13,07 stig |

## Nú skal bera ella bresta hjá AaB

**Hóskvøldið spælir felagið hjá Jón Róa Jacobsen og Súna Olsen seinnu hálvfinaluna í steypakappingini, og nú skal kappingarárið bjargast, má liðið vinna fyri fyrstu ferð í ár**

**FÓTBÓLTUR**
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

AaB skal vinna ein dyst fyri fyrstu ferð í ár, um felagið ætlar sær í donsku steypafinaluna í fótbólti, sum verður spæld Kristi Himmalferðardag.

Hóskvøldið spælir AaB seinnu hálvfinaluna ímóti Randers FC á heimavølli, og eftir 0-0 í fyrra dystinum, skal AaB nú vinna. Randers spælir í næstbestu donsku deildini, og tí er felagi hjá Jón Róa Jacobsen og Súna Olsen favorittur til dystin hóskvøldið.

Málmaðurin og liðformaðurin hjá AaB, Jimmy Nielsen, vónar, at áskoðararnir av álvara fara at stuðla liðnum til týdningarmikla steypadystin.

– Hetta er týdningarmesti dysturin hjá okkum í ár, og bæði vit á vøllinum og øll rundan um vilja so gjarna í steypafinaluna og vinna hana, sigur Jimmy Nielsen við heimasíðuna hjá AaB.

– Nú er tað av álvara, at spælarar og áskoðarar skuu vísa, at vit standa saman, tí tað verður brúkt fyri øllum stuðli, sum vit kunnu fáa í hesum dystinum, sigur hann.

### Skulu upp í ferð

AaB hevur ikki megnað at vunnið ein dyst í superliguni, síðani kappingin byrjaði aftur í mars mánaði. Seks javnleikir hevur liðið úr Aalborg megnað at skravað saman, men fyrsti sigurin bíðar framvegis.

– Eg rokni við einum sera hørðum dysti ímóti Randers, men vit skulu brúka høga leikferð, sum er størsti munurin ímillum superliguna og 1. deild. Vit skulu seta okkum á dystin og spæla skjótt, sigur Jimmy Nielsen.

AaB-venjarin Erik Hamrén hevð ikki tikið spælararnar út til dystin, tá ið vit høvdu evstamark á blaðnum fyrr í dag, men roknað verður við, at bæði Súni Olsen og Jón Rói Jacobsen verða við í hópinum.

# FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*

ATLANTIC AIRWAYS






**Hvar er bólturin?**
Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.